# TILTØK

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Týsdagin kl. 20 Hornvenjing.
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti.
Kristihimmalferðardag kl. 20 verður almennur fundur við majorunum Marianne og Torgeir Nybo. Marianne greiðir frá arbeiðinum sum gøtuoffiserur í Oslo.
Kvinnustevnan byrjar fríggjadagin kl. 20.00.

**Meinigheitshúsið**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími, Opinberingin kap. 1.
Mikukvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Kristi himmalferðardag kl. 18 Møti við Klæmint Tausen, Teir 4 syngja.
Fríggjakvøldið kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Kurt Joensen frá SAT7, Fríða syngur.

**á Fløtum**
*Landavegur 98*
Bíbliugransking við Pætur M. Hansen verður mánakvøldið kl. 20, evnið: Galatiabrævið 4.12. Øll eru vælkomin.

**Hebron, Argir**
Mikukvøldið verður einki møti í Hebron.
www.hebron.fo

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Í kvøld kl. 20 Bøn og bíbliutími har Jógvan Z. undirvísir um Opinberingina kap. 21-22.

**Samkoman Rhema**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli.
www.rhema.fo

**Frá Ebenezer**
Týsdagin kl. 20.30 Sangvenjing.
Mikudagin einki møti.
Hósdagin Kr. himmalsf. kl. 18 Evangel. møti.
Fríggjadagin kl. 21 Teen-Night.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í morgin kl. 17 Bøn fyri býnum og Ísrael.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti. Spennandi kvøld við kappingum, spølum o.ø.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Rúna Rasmussen, kl. 11.50 Sunnudagsskúli og ABC: Evnið er »At verða leiddur av Heilaga Andanum«. 2. partur v/ Jaspur Johannesen, kl. 18 Sjónvarpsmøti í Evangeliihúsinum.
Mánadagin kl. 20 Bønarskúlin v/ Annu Guttesen.
www.filadelfia.fo

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Kristi Himmalferðardag Hámessa kl. 11 v/ Andrzej Wydrzynski, prestur í Mariukirkjuni.
Fríggjadagin biðja vit rósukransin saman í Kerit kl. 19.30.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa v/ Andrzej Sydrzynski, prestur í Mariukirkjuni.
Kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Nesvík**
Felagsmissiónsvikan byrjar í morgin mikudagin við bønarmøti kl. 19 og møti kl. 19.30 við Ólavi Jacobsen, úr Hósvík, sangbólkur úr Norðurstreymoy syngur.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Vitjan av Flemming Berg og Torben Søndergaard:
Ungdómsmøti fríggjakvøldið kl. 21 og leygarkvøldið kl. 21.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og kl. 19 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Á fundinum Kristi himmalferðardag kl. 18 talar Ragnar Niclasen og greiðir frá trúboðaravirki á Filipsoyggjunum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Leirvík.**
Kristi himmalsferðardag kl.18.00 Sang og vitniløta.
Sunnudagin møti kl.18, tey ungu skipa fyri.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Preben Hansen og aðrir tala.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið kl. 20. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikukvøldið kl. 20 Bíbliutími. Øll eru vælkomin. Kriti himmalsferðadag einki møti vegna møti í Húsavík.

**Frá Heimamissiónini**
Meinigheitskórið hevur møti í Ungmannahúsinum »Samljóð« í Skopun Kristi Himmalferðadag kl. 17.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ungmannafelagshúsið Sólarris, Húsavík**
Kristim himmalsferðadag kl. 18 Sang og vitnimøti, Kajberg Davidsen talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Íslendski presturin og trúboðarin Helgi Bjóbjartsson (ið tosar norskt) hevur møti í kvøld og mikukvøldið, bæði kvøldini verður byrjað kl. 20.00. Kórið av Tvøroyri syngur í kvøld og kórið úr Porkeri syngur mikukvøldið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Týskvøldið kl. 20 Heimaforbundið.

**Føroyahúsið**
Fríggjakvøldið 21. mai kl. 20.30 hevur Kristnastova fríggjakvøldsmøti í Føroyahúsinum. Jógvan Jacobsen talar. Vitnisburður. Nógvur góður og lættur felagssangur við sera góðum tónleikarum og sangarum. Ókeypis te/kaffi og køkur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kristnastova**
Fríggjakvøldið 21. mai er fríggjakvøldsmøti ikki í Kristnastovu, men í staðin í Føroyahúsinum kl. 20.30.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagur 17. mai*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum.
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan mikudag, tlf. 316491
**Túrur til Eiðis 26. mai kl. 10.00 úr Steinatúni, vitja verður glassmiðjuna hjá Elisabeth og Páll Ellingsgaard, síðani verður døgurði í Lonini. Aftur í Havn uml. kl. 16.00. Kostnaður 150,- gjaldast áðrenn kl. 12.00 24. mai**
*Týsdagur 18. mai*
kl. 10-11.30 Vit syngja saman við løgtingslimum, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Myndir á stórskíggja frá túrinum í Kalsoynni
*Mikudagur 19. mai*
kl. 10-12 Handverk. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 12 Vit gera døgurða í Tilhaldinum. Øll eru hjartaliga vælkomin at vera við
kl. 14-16 Undirvísing í Boccia í kjallaranum
kl. 15 Túrur niðan Listaskálan – vit ganga fram við ánni í Viðarlundini
*Hósdagur 20. mai*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-16 Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagur 21. mai*
kl. 10-12 Handverk, øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 12-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mánadagin 17. mai*
Vit lurta eftir Marin Norðbø jarðamóðrini á Sandi, tá hon sigur frá. Hetta er ein upptøka, ið útvarpið sendi í 1965.
*Mikudagin 19. mai*
Vit spæla Boccia. Vit byrja kl. 14 í Virkinum við løttum fimleiki og spæla síðani í liðunum reyða og bláa.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
*Mánadagin 17. mai*
Fimleikur við Jóhannu Troest
*Týsdagin 18. mai*
Ítriv fyri áhugað
*Mikudagin 19. mai*
Undirvísing í Boccia v/ Jóhan Danielsen
*Hósdagin 20. mai*
Kristi Himmalferðardagur – stongt
*Fríggjadagin 21. mai*
Opið hús

*Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks.*

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**Lymfødemfelagið**
*Box 2113, FO 165 Argir*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Javni**
*Hoydalsvegur 40 · 3 hædd*
Skrivstovan hjá Javna er opin týsdag til fríggjadag frá kl. 10-14.
Tlf. nr. 314827 · faks 310557.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

## SILVURBRÚDLEYP

Mikudagin 19. mai hava hjúnini Hervør og Poul Jacob Joensen í Klaksvík silvurbrúdleyp. Vælkomst verður í Skálanum frá kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## BRÚDLEYP

Leygardagin 22. mai kl. 16.00 giftast í Sands kirkju Páll á Reynatúgvu, Sand og Kristina Johannesen, Sand. Kl. 20.00 verður borðhald fyri innbodnum í Virkinum á Sandi.

Leygardagin 5. juni kl. 11.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík, Sonja Sólbjørg, Klaksvíko g Jonhard Danielsen, Søldarfjørður. Veitslan verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 22. mai á tlf. 442099, 441199 ella 455438.

Leygardagin tann 19. juni kl. 15.00 giftast á býráðsskrivstovuni í Vági Malan Klakkstein og Alex Vilhelm. Vælkomst verður í VB-húsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 374004, 269537 og 573006 innan 28. mai 2004.

10. juli kl. 16.00 giftast í Vesturkirkjuni Solina Joensen, Skopun og Hans Ib Jacobsen, Tórshavn. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, kunnu tekna seg á tlf. 255263 ella 320391 eftir kl. 19.00. Seinasta freist at tekna seg er 15. juni.

## GULLBRÚDLEYP

Sunnudagin 4. juli hava hjúnini Jóna og Hans Jacob Andreasen, Klaksvík, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin á Tekniska skúla í Klaksvík leygardagin 3. juli kl. 16.00. Tey, sum vilja gleða gullbrúðarparið við at koma í veitslu, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 455782 ella 456772 innan 21. juni.



# Ókeypis kalt vatn til børnini

**Fyribyrgingarráðið hevur gjørt av at veita skúlabørnum í Tórshavnar Kommunu ókeypis vatn. Hetta verður gjørt, tí Fyribyrgingarráðið ásannar, at ov nógv sodavatn verður drukkið millum tey yngru, sum kanningar eisini vísa**

FYRIBYRGING
*Hans Kárason Mikkelsen*
*hans@sosialurin.fo*

– Endamálið er at geva børnunum ein valmøguleika ístaðin fyri ein peikifingur, sigur Bjarta Vilhelmsen.

Bjarta er limur í Fyribyrgingarráðnum, sum stendur aftanfyri stóra vatntiltakið í høvuðsstaðnum.

– Allir skúlar í Tórshavnar Kommunu hava fingið vatnautomatir frá Fyribyrgingarráðnum, sum Fyribyrgingarráðið hevur goldið. Hetta er eisini fyri at læra børnini at velja vatn. Tí børn elska vatn. Tað skal bara vera kalt og ikki úr vatnhananum, sigur Bjarta Vilhelmsen, limur í Fyribyrgingarráðnum.

Kanningar hava víst, at tá børn hava dagliga atgongd til kalt vatn, so minkar nýtslan av sodavatni týðuliga.

Ætlanini er, at automatirnar skulu standa soleiðis, at tað er lætt at koma til. Sum skilst eru allar automatirnar komnar upp á pláss.

Talan er um eitt royndarprojekt, sum heldur áfram í eitt hálvt ár. Um tað vísir seg, at tiltakið verður væleydnað, so er ætlanin at víðka virksemið og veita ókeypis kalt vatn til øll skúlabørn í Føroyum.

Átta skúlar eru í Tórshavnar Kommunu, og tá eru skúlarnir í Kollafirði og Kaldbak taldir uppí. Tilsamans eru 13 vatnautomatir settar upp. Fyribyrgingarráðið hevur goldið allan kostnaðin, men vil ikki upplýsa, hvussu nógv tað hevur kostað.


*Allir skúlar í Tórshavnar Kommunu hava fingið vatnautomatir frá Fyribyrgingarráðnum, sum Fyribyrgingarráðið hevur goldið. Á myndini síggja vit vatnautomatirnar á Argja Skúla*

### TIPS 13 úrslit
**Vika 20 – 15. mai**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Arsenal–Leicester | 1 |
| 2. | Aston Villa–Manchester U | 2 |
| 3. | Blackburn–Birmingham | X |
| 4. | Bolton–Fulham | 2 |
| 5. | Charlton–Southampton | 1 |
| 6. | Chelsea–Leeds | 1 |
| 7. | Liverpool–Newcastle | X |
| 8. | Manchester C–Everton | 1 |
| 9. | Portsmouth–Middlesbrough | 1 |
| 10. | Wolverhampton–Tottenham | 2 |
| 11. | Schalke 04–Kaiserslautern | 1 |
| 12. | Stuttgart–Bayern München | 1 |
| 13. | Werder Bremen–Leverkusen | 2 |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 13 røtt: | **59.470,- kr.** |
| 12 røtt: | **1.089,- kr.** |
| 11 røtt: | **100,- kr.** |
| 10 røtt: | **21,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum

### TIPS 12 úrslit
**Vika 20 – 16. mai**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | AaB–Herfølge | 1 |
| 2. | AGF–Frem | 1 |
| 3. | Brøndby–FC Midtjylland | 1 |
| 4. | Esbjerg–FC København | 2 |
| 5. | OB–FC Nordsjælland | X |
| 6. | Viborg–AB | 2 |
| 7. | Horsens–Køge | X |
| 8. | Nykøb. F All–B 1913 | 1 |
| 9. | Holbæk–Holstebro | 1 |
| 10. | Hvidovre–Jetsmark | X |
| 11. | Kolding FC–HIK | X |
| 12. | Næstved–Kalundborg | X |

**Prognosa:**

| | |
|---|---|
| 12 røtt: | **71.219,- kr.** |
| 11 røtt: | **3.712,- kr.** |
| 10 røtt: | **284,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum




**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




**Frumsýning – Billettprísur: 80,- kr.**
Mikudagin 19.05. kl. 19[00] Mikudagin 19.05. kl. 22[30]
Hósdagin 20.05. kl. 19[00] Hósdagin 20.05. kl. 22[30]




Týsdagin 18.05. kl. 22[30] Mikudagin 19.05. kl. 20[45]
Hósdagin 20.05. kl. 20[45]




Týsdagin 18.05. kl. 22[00] Mikudagin 19.05. kl. 23[00]
Hósdagin 20.05. kl. 23[00]




Týsdagin 19.05. kl. 19[45] Mikudagin 19.05. kl. 16[15]
Hósdagin 20.05. kl. 16[15]




Týsdagin 18.05. kl. 19[30] Mikudagin 19.05. kl. 18[30]
Hósdagin 20.05. kl. 18[30] – *Seinasta sýning*

**KOMANDI FILMUR**




**Heimsfrumsýning – Forsølan er byrjað**
Fríggjadagin 28.05. kl. 20[15] Fríggjadagin 28.05. kl. 23[00]

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**